tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.09.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Reidar Simonsen

Ikki møtt: Alvi Mortensen, fráboðað

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| | | |
|---|---|---|
| **Málsyvirlit** | | |
| **Til støðutakan** | | |
| 57/22 | 22/00011-2 | Fíggjarætlan 2023 |
| 58/22 | 22/00138-1 | Ítróttarhølllin -dagføringar/umvælingar av gólvinum í ítróttarhøllini 2022 |
| 59/22 | 21/00627-2 | Forskúla -stovnseting av forskúla á Tvøroyri 2021 |
| 60/22 | 21/00451-20 | Lukka mál. |
| **Til kunningar** | | |
| 31/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| 32/22 | 22/00340-1 | Kommunusamanlegging |
| 33/22 | 22/00035-2 | Mýrifípan -Intranet |
| 34/22 | 22/00361-2 | SUSVIM - Umsókn um atgongd til svimjihylin í Tvøroyrar skúla |
| 35/22 | 22/00165-1 | Sálarfrøðilig tænasta -tilboð um veitan av sálarfrøðuligari "psykologi" viðgerð í Tvøroyrar kommunu. |
| 36/22 | 20/00350-10 | Kommunulæknaviðtalan á Tvøroyri -støðulýsing aug. 2022 |
| 37/22 | 22/00235-9 | Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 502a á Tvøroyri - |
| 38/22 | 22/00366-1 | Suðuroyar Ellis- og røktarheim á Traðarvegi 4, Tvøroyri |

| | | |
|---|---|---|
| 39/22 | 21/00407-5 | Felagsundirvising i føroyskum fyri tilflytarum |
| | | |

Kristin Michelsen fráboðar at Alvi Mortensen hevur fráboðað at hann ikki kann møta til fundin.

1. Varafólk Jónhild Midjord Nybo hevur givið boð um, at honn fær ikki møtt.
2. Varafólk Mina Joensen hevur givið boð um, at honn fær ikki møtt.
3. Varalimur Reidar Simonsen hevur fráboða, at hann kann møta.

Atkvøtt verður um hvørt Reidar Simonsen sum 3 valdur á lista «T» Felagslistin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 kann taka sætið í býráðnum. Einmælt samtykt.

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa.
Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við skránni, tí at málið «val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS» ikki er á skrá, og ynskjir hon at hetta mál verður sett á skrá, har liminir verða valdur samb. lutfallvalháttin.

Súsanna Bertholdsen ynskir eisini mál á skrá, hvørt ítøkiligar samráðingar eru millum Heilsumálaráðið og Tvøroyrar býráð um yvirtøku av bygninginum, har Suðuroyar Ellis- og Røktarheim húsast í dag, og kunning um víðkanina av opningstíðunum av bingjuplássinum.

Kristin Michelsen upplýsir, at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 2 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021.

Kristin Michelsen upplýsir at málið viðv. Ognarviðurskiftinum av Suðuroyar Ellis- og Røktarheim er sett á skrá til fundin í dag.

Kristin Michelsen upplýsir, at hann hevur avgjørt í samráð við form. í Teknisku deild, og arbeiðsform. hjá kommununi at víðkað um opningstíðinar og harvið betra um tænastustøði á bingjuplássinum sum eina roynd í 3.mnd í samband við at starvsfólk hjá Teknisku deild, ið vanl. røkir bingjuplássið, er fari í farloyvið í 3. mnd.

Til støðutakan

**57/22**
**22/00011-2 Fíggjarætlan 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 90/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 57/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 18.09.2022)**
Mælt verður til at byrja uppá uppskot til fíggjarætlan 2023 og at fíggjarætlanin verður ætlandi viðgjørd av sum niðanfyri:

- 18. september verður áheitan sent til allar nevndarform/kv. og deildarleiðarar um at byrja uppá fíggjarætlan fyri 2023.
- 29. September, uppskot/kunning til fíggjarætlan "FÆ2023" verður viðgjørd á býráðsfundi 30 september, har ásett verður inntøkumetingar, barnafrádrátt og skattaprosent.
- 27. Oktober, 1. viðgerð verður at leggja fyri býráðið til samtyktar 27. Oktober.
- 24. November, 2. viðgerð, *-fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember-*, verður viðgjørd á býráðsfundinum, sum er lýstur at vera 24. November.

Samb. Fráboðan frá TAKS, er skattainntøkur fyri 2023 mettar at blíva: **kr. 66.793.226,-**

**Skattagrundarlag:**

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | 372.154.000,- | |
| B-Inntøka: | 17.300.200,- | 389.454.200,- |
| | | |
| FAS-Inntøka: | (-7.086.170,-) | |
| Inntøkufrádr.: | (-1.042.739,-) | |
| Sjófrádr.: | (-2.719.734,-) | (10.848.643,-) |
| Skattskyldug inntøka: | | 378.605.557,- |
| Botnfrádráttur: | | (40.948.973,-) |
| | | |
| **Inntøkugrundarlag:** | | **337.656.584,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | 70.570.226,- | |
| Barnafrádráttur: (393 x 7.000,-) | (-2.751.000,-) | |
| Pensionistafrár: (342 x 3.000,-) | (-1.026.000,-) | |
| **Netto A-skattur:** | | **66.793.226,-** |
| P/F Skattur: | 2.000.000,- | 2.000.000,- |
| | | |
| **Mettar inntøkur í alt (2023)** | | **68.793.226,-** |

Borgarstjórin mælir til, at galdandi fyri skattaárið 2023 verður ásett sama skattaprosent og sami barnafrádráttur, ið hevur verði galdandi í skattaárinum 2022.

Tilmælið fyri skattaárið 2023 er, at inntøkugrundarlagið fyri Fíggjarætlanina fyri 2023 verður grunda á:
- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. 7.000,-
- P/F skattur kr. 2.0 mió.

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin
- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
  - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.***

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2023

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Mælt verður til at halda sama skattaprosent og barnafrádrátt galdandi fyri ár 2023, ið var samtyktur í 2022, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at varveita sama kommunuskatt á 20,9%, sama barnafrádrátt á kr. 7.000,- og inntøkumeting av P/F skatti á kr. 2.0 mió.

**58/22**

**22/00138-1 Ítróttarhølllin -dagføringar/umvælingar av gólvinum í ítróttarhøllini 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 21/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 05.04.2022 | 41/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 25.08.2022 | 66/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 05.09.2022 | 83/22 |
| 5 Býráðið | 06.09.2022 | 53/22 |
| 6 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 76/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 91/22 |
| 8 Býráðið | 29.09.2022 | 58/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 5. Mars 2022**
Umsjónarmaðurin ítróttarhøllini hevur vent seg til kommunustjóran og forkv. í mentanarnevndini við kunning og áheitan um, at neyðugt er at dagføra/umvæla gólvið inni í Ítróttarhøllini.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Játtan á 400tkr. er avsett á FÆ2022, §533 til gólv í Ítróttarhøllini.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Einmælt samtykt at dagføra gólv í ítróttarhøllini. Tekniskileiðarin kannar kostnaðin og innheintar tilboð, áðrenn arbeiði verður sett í gongd. Málið verður á skrá aftur til komandi fund í Mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 05. april 2022:**
Einmælt samtykt at seta arbeiði í gongd innan fyri játtanina á FÆ2022

**Kommunustjórin 5. juli 2022**
Samb. Fráboðan frá veitara verður kostnaðurin at umvæla gólvið í ítróttarhøllini kr. 512.750,- ex. MVG. Avsett á FÆ2022 eru kr. 400.000,-

**Kommunustjórin 04.08.2022**
Tilboð er móttikið frá nýggjum veitara, har kostnaðurin at umvæla gólvið í ítróttarhøllini kr. 428.150,- ex. MVG. Avsett á FÆ2022 eru kr. 400.000,-

Íroknað hesum tilboði eru eykakostnaður:

- kr. 22.500,- fyri nýggj alu. mál
- Kr. 10.000,-flogbótsvøllur i øðrum liti
- Kr. 20.500,- fyri ferð og gisting.

Ikki við í tilboðnum er kostnaðurin av at flyta tilfari til Føroyar. *«Prisen er ekskl. Moms og afgifter på Færøerne. Materialer leveres til angivet speditør i Danmark»*

**Mentanarnevndin 25. august 2022:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum uppá kr. 428.150,- ex. MVG.
Meirkostnaður verður fíggjaður av játtanini hjá Mentanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 05. september 2022:**
Nevndin er kunnað um, at Kim Thomasen nú mælir til, atarbeiðið verður útsett til 2023, og at tað tískil ikki er neyðugt at fáa eykajáttan í 2022.
Málið verður beint aftur í Mentanarnevndina.

**Býráðið 06. september 2022:**
Málið er tikið av skrá og verður viðgjørt aftur í Mentanarnevndini ný nýggir upplýsingar fyriliggja.

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Einmælt samtykt ikki at skifta gólv í inniverandi ári, orakað av at hetta kemur at órógva venjingar í høllini. Mælt verður til, at játtanin ístaðin verður avsett til útskiftan av orkusparandi hitaketlum í Ítróttarhøllini í inniverandi ári. –málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Einmælt samtykt at játtanin verður flutt til útskiftan av oljuketlum. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**59/22**
**21/00627-2 Forskúla -stovnseting av forskúla á Tvøroyri 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.12.2021 | 113/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 7/22 |
| 3 Býráðið | 22.02.2022 | 15/22 |
| 4 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 12/22 |
| 5 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 75/22 |
| 6 Býráðið | 29.09.2022 | 59/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.10.201**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir mál á skrá at viðgerða stovnseting av forskúla á Tvøroyri.

**Lógargrundarlag:** Kunngerð um skipan og læring í forskúla við heimild í § 4, stk. 4 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007 og løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011.

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022 avsetan av játtan

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 07. december 2021:**
Málið var umrøt og kunna, verður tiki upp á seinni fundi.
Einmælt samtykt at seta ein arbeiðsbólk.
Málið verur umrøt við skúlastýri, skúlaleiðsluna og leiðsluna í barnagarðinum.

**Mentanarnevndin 08. februar 2022:**
Anita Vibergsdóttir greiddi frá, at fundur hevði verði í býráðssalinum 7. feb. 2022 har møtt vóru, Anita Vibergsdóttir forkv. í Mentanarnevndini, Mona Brattalíð deildarleiðari í Trongisvágs skúla, Kari Petersen leiðari av barnagarðinum Mýrifípan, og Fróði Mortensen kommunustjóri, at viðgerða uppskotið um møguliga stovnsetan av forskúla í Tvøroyrar kommunu.

Niðurstøðan av fundinum 7.feb. 2022 var at velja eina nevnd uppá í mestalagið 5 persónar, ið skuldi arbeiða víðari við ætlanini. Avtala var á fundinum, at nevndin skuldi vera umboða av 2 limum úr skúlanum, 2 limum úr Mýrifípuni og 1. limi frá Tvøroyrar kommunu.

Tilmælið er at seta á stovn forskúla á Tvøroyri, og at hesin verður at byrja skúlaári aug. 2023. Jónleyg J. Bech skjýtir upp, at Anita Vibergsdóttir verður at umboða Tvøroyrar kommunu í nevndi at fyrireika forskúla, og var hetta einmælt samtykt. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 22. februar 2022:**
Anita Vibergsdóttir mælir til, at arbeitt verður fram ímóti, at stovnseta forskúla til skúlabyrjan ár 2023. Atkvøtt var um tilmælið hjá Anitu Vibergsdóttir. Einmælt samtykt.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Mentanarnevndini, at nevndin at fyrireika forskúlan verður manna við 5 umboðum, har skúlin verður umboðaður við 2 umboðum, barnagarðurin verður umboðaður av 2 umboðum og kommunan velur 1. umboð. Einmælt samtykt.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Jónleyg J. Bech, at Anita Vibergsdóttir verður at umboða av Tvøroyrar kommunu í nevndi at fyrireika forskúla. Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 09.06.2022**
Forkv. Í mentanarnevndini, Anita Vibergsdóttir, ið er vald sum umboð í nevndinia at fyrireika stovnsetan av forskúla á Tvøroyri ynskir at geva eina støðulýsing um tilgongdina at seta á stovan forskúla á Tvøroyri, nú nevndin hevur havt fyrireikandi fundir og vitja forskúlar í Tórshavn og Rúnavík.

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Anita Vibergsdóttir, forkvinna í Mentanarnevndini kunnar um máli.

**Kommunustjórin 12.09.2022:**
Forkv. í mentanarnevndini, sum eisini er forkv. í nevndini, ið fyrireikar stovnsetan av forskúla á Tvøroyri, ynskir málið á skrá í mentanarnevndini, at viðgerða tilmælið frá forskúlanevndina.

*Forskúlanevndin hevur fund beint frammanundan fundin í mentanarnevndini ónsdagin 14. sep., kl. 15.00, har tilmælið til forskúla verður endaliga orðað. Eftir fundin í forskúlanevndini, eru nevndarlimirnir boðin at møta til fundin í mentanarnevndini, at greiða frá um tilmælið og gongdina fram ímóti at seta á stovn forskúla á Tvøroyri.*

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Forskúlanevndin var møtt til fundin, har Anita Vibergsdóttir kunnaði um tilmælið hjá forskúalnevndini. Einmælt samtykt tilmælið hjá forskúlanevndini.

**Býráðið 29. september 2022:**
Anita Vibergsdóttir greiddi frá um ætlanina og tilmælið hjá fyrireikingarbólkinum at seta á stovn forskúla í Tvøroyrar skúla.

> Fyrireikingarbólkurin mælir einmælt til at seta á stovn forskúla í Tvøroyrar kommunu til skúlaársbyrjan 2023, og at hetta verður skipa samb. Kunngerð um skipan og læring í forskúla.
>
> *"Kunngerð um skipan og læring í forskúla við heimild í § 4, stk. 4 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007 og løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður ásett"*

Dentur verður lagdur á trygga og góða skúlabyrjan har forskúlin verður ein brúgv millum barnagarð og skúla.

Mælt verður til at forskúlin kemur at húsast í Trongisvágs skúla stovu 6 & 7, ið er ein dupultstova, sum verður innrætta til forskúla tørv.

Tá forskúlin er liðugur møta børnnini í frítíðarskúlanum, ið heldur til har útibarnagarðurin húsast d.d.

Mælt verður til, at søkt verður eftir starvsfólkum til forskúlan í inniverandi ári, einum forskúlalærara, einum námsfrøðingi og hjálparfólkum eftir tørvi.

Fyrireikingarbólkurin mælir til, um samtykt at skipa fyri einum almennum kunnandi fundi í heyst fyri foreldrum at børnum, sum byrja í forskúla í aug. 2023.

Fyrireikinagarbólkurin skipar fyri almennum kunnandi fundi um skipan av forskúla á Tvøroyri í Trongisvágs skúla ónsdagin 5. oktober, kl. 19.00.

Fyrireikingarbólkurin var umboðaður av: Anita Vibergsdóttir, Jón Johannesen, Mona Brattalíð, Kari Petersen og Karin Kristina Eysturberg

**Tvøroyrar býráð 29.09.2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini og fyrireikingarbólkinum.
Einmælt samtykt, at gjaldið fyri forskúlan verður kr. 700,-/mðr. og at goldið verður fyri 11 mðr.
Einmælt samtykt, at gjaldið fyri frítíðarskúlan verður kr. 1.200,-/mðr., og at goldið verður fyri 11 mðr.
Einmælt samtykt, at forskúlaskipanin verður umfatað av galdandi avsláttarskipan hjá Tvøroyrar kommunu fyri ansingarøkið.

## 60/22 –Lukka Mál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 8/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 24/22 |
| 3 Býráðið | 29.09.2022 | 60/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.05.2022**

**Lógargrundarlag: Matrikkullógin**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til kunning og støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**

**Býráðið 31. maj 2022:**

**Kommunustjórin 22. september 2022:**

**Býráðið 29. september 2022:**

Til kunningar

**31/22**
**22/00096-1 Skattatøl 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 5/22 |
| 6 Býráðið | 05.05.2022 | 11/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 6/22 |
| 8 Býráðið | 31.05.2022 | 21/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 9/22 |
| 10 Býráðið | 30.06.2022 | 26/22 |
| 11 Fíggjarnevndin | 05.09.2022 | 14/22 |
| 12 Býráðið | 06.09.2022 | 29/22 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 15/22 |
| 14 Býráðið | 29.09.2022 | 31/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. april 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 05. september 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 06. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**32/22**
**22/00340-1 Kommunusamanlegging**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 06.09.2022 | 56/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 32/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 03. sept. 2022**
Borgarstjórin Kristin Michelsen ynskir at leggja mál fyri Tvøroyrar býráð, at fáa heimila og taka stig til, at Tvøroyrar býráð heitur á hvørja einstøku kommunu í Suðuroynni um at velja limir í ein arbeiðsbólk, at viðgerða sjálvbodna kommunusamanlegging í Suðuroynni.

Mælt verður til at limirnir í bólkinum eru óheftir politiskt, at arbeiðsbólkurin skipar seg sjálvan, og fær heimild at ráðføra seg uttanhýsis. Tilmælið um arbeiðssetning hjá bólkinum er, at hesin fremur eina lýsing av hvørjari kommunu sær, við m.a. lýsing av fyrimunum og vansum við kommunusamanlegging í Suðuroynni. Arbeisbólkurin orðar eina niðurstøðu, ið verður løgt til støðutakan hjá hvørjari kommunu sær innan 31.12.2023.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018
- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Tilgongd frammanundan:**
Samanlegging av kommununum í Suðuroynni hevur verið viðgjørd politiskt í 20-25 ár, uttan at nøkur samanlegging er framd. Løgtingið hevur í fleiri umførum viðgjørt spurningin um kommunusamanlegging, har ímillum at tvinga kommunur at leggja saman við lóg, men enn er ikki meiriluti fyri hesum í løgtinginum.
Fleiri kommunusamanleggingar eru tó framdar higartil aðrastani í landinum, og felags fyri tær samanlegging eru, at hesar eru gjørdar á sjálvbodnum grundarlag. Tí hevur tað verið upp til kommunurnar at gera av og til landsstýrið at góðkenna einstøku samanleggingarnar.

Fólkaatkvøða hevur verði í fleiri føru um kommunusamanlegging, og seinast hósdagin 3. mai 2012, har yvirornaða úrsliti var, at Suðuroyingar ynskja kommunusamanlegging, spurningurin er bert hvussu og nær. Nú eru so 10 ár liðin síðan fólkaatkvøðuna, og enn er onki stig tikið til kommunusamanlegging.

Hví samanlegging?
Tað eru nógvar góðar grundir til at skipa samfelagið við stórum og sterkum kommunalum eindum. Tað snýr seg um at hava búskaparliga og umsitingarliga burðardyggar eindir, sum kunnu geva borgarunum bestu tænasturnar og best møguligt røkja uppgávurnar í nærumhvørvinum.

Krøvini hjá borgarunum eru alsamt vaksandi, og borgarin velur tað øki ella kommunu, har tað er best at liva og virka - búskaparliga og sosialt. Kommunurnar kappast sína millum um skattaborgarar, og smærri kommunurnar hava nógv truplari við at lúka vaksandi krøv, halda fast við og draga at sær fólk.

Eygleiðingin er, at lokala fólkaræðið í Suðuroynni er veikt mótvegis Miðstaðarøkinum, og ungaættarliði velur Suðuroynna frá. Kappingin millum kommunurnar í Suðuroynni, um skattaborgarar ótti heldur verði at fáa skattaborgarar til Suðuroynni uttan mun hvar í Suðuroynni hesir veja at seta búgv.

Metingin at fáa eitt demokrati at virka nøktandi, er neyðugt við einum ávísum størri fólkagrundarlagi í einari eind. Hetta vil skapa dynamikk og virka mennandi á fólkaræði. Fleiri fólk fáa høvi at taka lut og fáa ávirkan á viðurskiftini í lokaløkinum, og veljarin fær fleiri valevnir at velja ímillum í einari størri kommunalari eind.

Tað røkkur ikki á mál við bara betri infraskipan og sjálvbodnum óformligum samstarvi. Kommunusamanlegging og økismenning er við til at skapa betri grundarlag fyri vinnuligum virksemi og búskaparvøkstri, sum aftur minkar um arbeiðsloysið og harvið skapar fólkavøkstur.

Við verandi samanbinding av við tunlum og vegum eru tað spill av tilfeingi, at gjørdar verða stórar íløgur í anlegg av ymiskum slag í kommunum, sum liggja lið um lið - dupultíløgur. Við størri kommunalum eindum kunnu gerast færri og meira dygdargóð anlegg. Harumframt kunnu eindirnar gera nýggjar íløgur, sum tær annars ikki megnaðu at gera hvør sær.

**Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi ein kanning í 2004, ið nevndis:**
«Kommunusamanlegging - hvat siga suðringar? Status quo, kommunusamanlegging ella økt samstarv»?

*Hendan kanningin vísti, at ein meiriluti av suðringum ynskja kommunusamanlegging. Tað eru nógv, ið halda at kommunusamanlegging fer at hava fyrimunir við sær. Fyrst og fremst vænta næstan øll, at kommunusamanlegging fer at hava við sær, at oyggin fer at standa sterkari út-at-til, og at samanhaldi millum bygdirnar í oynni verður betri. Hetta kann tulkast sum, at nógvir suðringar eru troyttir av tí bygdaklandrinum, sum eisini er ein partur av veruleikanum í Suðuroynni. Stórur partur av teimum sum stuðla kommunusamanlegginum vænta eisini, at samanlegging fer at hava við sær betri og effektivari kommunalar tænastur. Um 80 % halda antin, at kommunusamanlegging eigur at fara fram sum skjótast ella at tað skal vera við kommunuvalið í 2008.*

*Kanningin vísti at 490 av teimum 502 sum luttóku í kanningini svaraðu uppá spurningin um teirra kommuna skal leggja saman við aðrari kommunu. Ein stórur meiriluti av hesum – heili 73,9 % - svaraðu ja, at tey hildu, at teirra kommuna eigur at leggja saman við eini aðrari kommunu. 15,5 % svaraðu nei, at teirra kommuna skuldi ikki taka lut í eini kommunusamanlegging, meðan 10,6 % søgdu seg ikki vita.*

*Um hugt verður at hvussu fólk í teimum einstøku kommununum hava svarað, so er ein greiður meiriluti fyri kommunusamanlegging í øllum kommununum í oynni. Serliga í Tvøroyrar kommunu eru borgararnir positivir um eina kommunusamanlegging – har eru heili 82 % fyri eini kommunusamanlegging. Í Vágs kommunu eru út við 70 % fyri eini kommunusamanlegging, og eru tølini fyri tær smærri kommunurnar nøkulunda tey somu. Í Hvalbiar kommunu, har stuðulin til eina kommunusamanlegging var minstur, søgdu umleið 60 % seg vera fyri eini kommunusamanlegging. Ein týðandi spurningur í kjakinum um kommunusamanlegging í Suðuroynni er spurningurin um, hvussu nógvar kommunu skulu verða í oynni. Kanningin vísti, at millum tey, ið halda at kommunurnar skulu leggja saman, var meiriluti fyri, at tær løgdu saman til 1 kommunu. Umleið 57 % hildu, at ein kommuna skal vera í Suðuroynni, meðan um 40 % hildu, at tvær kommunur skulu verða í oynni.*

**Fíggjarligar avleiðingar: ókent**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 06. september 2022:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri mælir til at Tvøroyrar býráð samtykkir fyriliggjandi uppskot og at býráðið heimilar borgarstjóranum at hava fund við allar borgarstjórar í Suðuroynni at viðgerða uppskotið.
Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 25.09.2022:**
Fundur var á Hamragarði hin 21. September 2022, kl. 18.30, har allir borgarstjórar og kommunuskrivarar møttu.

**Niðurstøðan á fundinum:**

1. Full semja var millum allar borgarstjórar, at hesir hvør í sær leggja uppskotið fyri teirra kommunustýrið, hvørt kommunan ynskir at vera umboðað í arbeiðsbólki, ið skal lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging í Suðuroynna.

2. Og um kommunustýrið tekur undir við uppskotinum, velur hvørt kommunustýrið sær **eitt** umboð í arbeiðsbólkin, sum fær til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging.

   Kristin Michelsen mælti til, at raksturin av arbeiðsbólkurin verður fíggjaður eftir sama býtislyklið, sum er galdandi fyri BHS. Hetta var breið semja um, treyta av at kommunustýrið samtykti uppskotið.

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt, at málið verður tikið upp aftur á einum seinni fundi, eftir at svar er komið frá øllum kommununum í Suðuroynni.

**33/22**
**22/00035-2 Mýrifípan -Intranet**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 18.01.2022 | 2/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2022 | 1/22 |
| 3 Sosiala nevnd | 14.09.2022 | 17/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 17/22 |
| 5 Býráðið | 29.09.2022 | 33/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2022**
Mælt verður til at Mýrifípan fær uppsett Intranet til at samskifta við børn, foreldur og starvsfólk.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Dátuverndarlógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mælt verður til at fíggja íbindingina kr. 60.000,- av §311 íløga í barnagarðin, og haldaragjald á kr. 3.600,-/mnd. av framhaldandi av §310 Mýrifípan.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 18. januar 2022:**
Einmælt samtykt og at játtanin verður sambart nýggja tilboð á kr 40.000,- við íbinding. Verður fíggja av íløgujáttanini hjá barnagarðinum. Leiðarin Kari Petersen vendur aftur við av hvørjum posti takast skal av.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialunevnd, og einmælt samtykt at umsitingin verður knýtt at somu skipan sum eina royndarverkætlan.

**Kommunustjórin 11.09.2022**
19. september kemur frá INTRA suður at hava starvsfólkafund í barnagarðinum. Ætlanin er at hann skal læra starvsfólkini alt um INTRA, so at tey kunnu vegleiða foreldrini. Fyri at fáa foreldrini við í INTRA, krevst upplýsingar og eitt samtykki frá teimum.

**Sosiala nevnd 14. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var kunnað.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 34/22
## 22/00361-2 SUSVIM - Umsókn um atgongd til svimjihylin í Tvøroyrar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 99/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 34/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.09.2022**
Umsitingin hevur fingið fyrisp. frá Susvim um atkomu til svimjihylin í Tvøroyrar skúla.
Felagið skrivar at:

*Vit í Susvim standa brádliga við tí trupulleika, at Pálshøll er stongd fyri almennari svimjing og skúlasvimjing. Susvim kann brúka hylin, men hylurin og brúsurnar eru køld, orsaka av at SEV ikki leverar hita, nú teir framleiða so nógva grøna orku. Vit kunnu ikki bjóða svimjarunum hesi viðurskiftir og vilja tí vita, um tað er møguligt at brúka hylin á Tvøroyri, meðan Pálshøll er stongd. Vit tita tíverri ikki, hvussu longi tað verður.*

*Dánjal Martin Hofgaard er høvuðsvenjari. Beint nú veit hann ikki, hvussu hann skal planleggja venjingina, tá hann ikki hevur ein hyl til taks. Vanliga venja tey 2 tímar seirnapart og hava eini 3 morgunvenjingar um vikuna eisini.*

*Vit kunnu sjálvandi ikki órógva almenna svimjing og svimjingina hjá skúlanum, men hugsa um at sleppa at svimja, tá hylurin er ledigur og so skjótt sum møguligt.*

*Vit vóna, at tit vilja hjálpa okkum, og at vit saman kunnu finna eina loysn. Vit hava nógvar kappingar fyri framman, bæði FM, meistarastevnu og aðrar kappingar.*

**Lógargrundarlag: Kommunusfulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 22. september 2022:</u>**
Einmælt samtykt at loyva Susvim at venja í svimjuhylinum í Tvøroyrar skúla. Hetta skal samskipast við húsavørðin í Tvøroyrar skúla, og atlit skal takast til skúlasvimjingina og almmennusvimjingina, ið ikki má órógvast av venjingini hjá Susvim.

**<u>Býráðið 29. september 2022:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**35/22**
**22/00165-1 Sálarfrøðilig tænasta -tilboð um veitan av sálarfrøðuligari "psykologi" viðgerð í Tvøroyrar kommunu.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 05.04.2022 | 13/22 |
| 2 Sosiala nevnd | 10.05.2022 | 16/22 |
| 3 Sosiala nevnd | 14.09.2022 | 15/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 16/22 |
| 5 Býráðið | 29.09.2022 | 35/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.03.2022**
Kommunustjórin mælir til, at Tvøroyrar kommuna tekur stig til, at møkuleikið verður fyri at veita vitalu í hølum hjá Tvøroyrar kommunu til sálarfrøðiliga viðgerð á Tvøroyri.

Sum nú er, er skulu fólk sum dragast við sálartrupulleikar ferðast úr Suðuroynni, og verður hetta ikki mett nøktandi.

Tilmælið er, at umsitingin fær heimild til at seta seg í samband við sálarfrøðing, og gera avtalu um møguliga veitan av viðtalu á Tvøroyri. At Tvøroyrar kommuna skapar karmarnir, dagførur og letur hølir ókeypis til sálarfrøðing á Sjógøtu 23.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: Ókent**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 05. april 2022:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum

**Kommunustjórin 23.04.2022**
Áheitan send til landstýrismannin í Heilsumáláráðnum Kaj Leo Holm Johannesen, hin 23. apríl. 2022.:

**Sosiala nevnd 10. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Kommunustjórin 08.09.2022**

**Sosiala nevnd 14. september 2022:**
Nevndin er kunna um svarið frá Heilsumálaráðnum

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**36/22**
**20/00350-10 Kommunulæknaviðtalan á Tvøroyri -støðulýsing aug. 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 06.09.2022 | 30/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 36/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04.08.2022**
Kunning um skriv/áheitan, ið er send til Heilsutrygd og Heilsumálaráðið.

**Sosiala nevnd 29. august 2022:**
Nevndin kann ikki góðtaka at læknaviðtalan stendur ómannað, og ynskir at vita um umsitingin hevur fingið nakað svar uppá skrivið, dagf. 27/7-2022, ið er sent til Heilsutrygd og Heilsumálaráðið.
Málið verður beint í býráðið sum lukkað mál.

**Kommunustjórin 03.09.2022**
Borgarstjórin hevur hin 26. Aug. 2022 móttikið teldupost frá landstýrismanninum, ið bjóðar borgarstjóranum á Tvøroyri og í Vági til fund tann 9. Sep. at viðgerða "Heilsutænastur til borgarar í Suðuroynni"

**Býráðið 06. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**37/22**
**22/00235-9 Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 502a á Tvøroyri -**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.09.2022 | 10/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 22/22 |
| 3 Býráðið | 29.09.2022 | 37/22 |

**Málslýsing:**
Byggiloyvi er latið til íbúðarbygging á matr. nr. 502a

**Tilmælið:** Kunning

**Tekniska nevnd 19. september 2022:**
Nevndin er kunnað um, at byggiloyvi er latið til 4 íbúðir á matr. nr. 502a.
Samstundis verður framd eina marknaumskipan, soleiðis at kommunan yvirtekur vegøkið omanfyri.

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**38/22**
**22/00366-1 Suðuroyar Ellis- og røktarheim á Traðarvegi 4, Tvøroyri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.09.2022 | 38/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27. September 2022**
Ognarviðurskiftini av bygningum, sum BHS, Bú og heimatænastan í Suðuroynni hevur sítt virksemi er samansett soleiðis.

- Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, staðsett á Traðarvegi 4 á Tvøroyri er ogn hjá sjálsognarstovni, ið aftur er ogn hjá øllum 7 kommunum í Suðuroynni. BHS hevur leigusáttmála.
- Sambýlið í Hvalba er ogn hjá Hvalbiar kommunu, BHS hevur leigusáttmála.
- Sambýlið í Vági, staðsett á Storvheyggi 9 er ogn hjá sjálsognarstovni, ið er ogn hjá Vágs kommunu, BHS hevur leigusáttmála
- Ellis og Røktarheimið "Hamragarður" er ogn hjá 4 kommunum, Hov, Porkeri, Vágur og Sumba, BHS hevur leigusáttmála.

Tvøroyrar kommuna hevur ikki fingið nakra áheitan frá landstýrismanninum í heilsumálum um ynskið at broyta ognarviðurskiftini av Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, staðsett á Traðarvegi 4 á Tvøroyri, sum tað verður kunna um í fjølmiðlum.

Mælt verður til, at leiðslan í BHS fær heimild at samskifta við landstýrismannin í heilsumálum, vegna Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, staðsett á Traðarvegi 4 á Tvøroyri, fyri at hoyra nærri um ætlaninar, ið sigst ganga út uppá, "at kommunurnar fáa pening frá landinum afturfyri at røktarheimini flyta út og geva sjúkrahúsunum karmarnar".

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt at heimila leiðsluni í BHS at samskifta við landstýrismannin í heilsumálum, vegna Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, staðsett á Traðarvegi 4 á Tvøroyri, fyri at hoyra nærri um ætlaninar, ið sigst ganga út uppá, «at kommunurnar fáa pening frá landinum afturfyri at røktarheimini flyta út og geva sjúkrahúsunum karmarnar»

39/22

**21/00407-5 Felagsundirvising i føroyskum fyri tilflytarum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.04.2021 | 30/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 29/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 08.06.2021 | 45/21 |
| 4 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 73/21 |
| 5 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 11/22 |
| 6 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 78/22 |
| 7 Býráðið | 29.09.2022 | 39/22 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 21.04.2021)**
Umsitingin hevur í hin 21.04.2021, móttikið uppskot til samstarvsavtalu um felagsundirvising i føroyskum fyri tilflytarum.

Samstarvsavtlan er gjørd av UMMR eftir fund millum allar borgarstjórar í Suðuroynni, undirvísarar í føroyskum fyri tilflytarar og Helenu Dam á Neystabø, umboðandi UMMR.

UMMR tekur ikki støðu til hvør kommuna tekur samskipanarleiklutin uppá seg. Men tað er helst nærliggjandi at hugsa, at tað verður Tvøroyrara kommuna, um kommunan er sinnað at taka uppgávuna. – Hetta var tað sum lá í luftini á fundinum við Helenu Dam á Neystabø á fundinum við allar borgarstjórar á fundi, ið var hildin í fundarhølinum hjá Varðin Pelagic 11. Mars 2021.

**Mentanarnevndin 23. april 2021:**
Einmælt samtykt, og mæla Tvøroyrar Býráð til at samtykkja samstarvsavtaluna. Málið verður beint í býráði.

**Kommunustjórin 24.05.2021**
Mælt verður til at:

1. Tvøroyrar kommuna átekur sær samskipanarleiklutin, at skipa undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum.
    a. (Verkætlanin er tó tengd av, at undirtøka fæst fyri hesum frá øllum kommununum í Suðuroynni)

2. Mentanarnevndin og kommunustjórin mæla til, -og hava tikið stig til- at heita á allar kommunurnar í Suðuroynni um at taka undir við at samskipa alla frítíðarundirvísingina í Suðuroynni, sum felags frítíðarundirvísing.

a. Hugsanin er, at allir borgarar í Suðuroynni tá fáa eins og javnbjóðis møguleika at luttaka í øllum frítíðarundirvísingartilboðum, sama hvar í Suðuroynni undirvísingin fer fram, hvør lærugreinin er og hvør undirvísarin er.
b. Metingin er, at ein felags kvøldskúli vil styrkja undirvísingina, har fleiri næmingar fáa møguleika at møta til undirvísing, og sannlíkt vil hetta eisini geva møguleika fyri, at undirvísarar kunna ferðast suður at undirvísa í lærugreinum, sum annars ikki vera boðin út í Suðuroynni.

3. Mælt verður til, at ein leiðari verður settur fulla tíð, sum samskipar alla frítíðarundirvísing í Suðuroynni – eisini undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar- og at kommunurnar bera raksturin av hesum eftir býtislykli javnbjóðis íbúgvum í hvørjari kommunu sær.

4. Fyri at røkka hesum málið, verður mælt til, at uppgávan verður løgd afturat samskipanaruppgávuni hjá leiðaranum av kvøldskúlanum á Tvøroyri, sum harvið –umframt framhaldandi kemur at virka sum leiðari av kvøldskúlanum- eisini fær ábyrgd av, at samskipa undirvísingina í føroyskum fyri tiflyttarum í samráð við UMMR sum eitt verkætlanarstarv.

    a. Verkætlanin verður endurskoða av kommununum og UMMR við endan av komandi skúlaárið.

***Uppskot til samstarvsavtalu um felags kvøldskúlaleiðsla viðvíkjandi Føroyskum sum annaðmál í Suðuroynni –Uppskot hjá UMMR***

*Tímajáttanin, sum UMMR játtar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál verður umsitin av einari kvøldskúlaleiðslu í Suðuroynni, sum verður Tvøroyrar kommuna, sum tryggjar at lærarar, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál fáa løn sambært reglunum um serstaka frítíðarundirvísing. Og sum tryggjar, at undirvísingin verður fyriskipað sambært ásetingunum í lóg og kunngerð.*

*Meðan hendan avtalan er í gildi, er tað er kvøldskúlaleiðslan í Tvøroyrar kommunu, sum samskiftir við UMMR og Undirvísingarstýrið um undirvísing í føroyskum sum annaðmál, tá ið tørvur er á tí.*

*Meðan hendan avtalan er í gildi, verður tað Tvøroyrar kommuna sum rindar lønirnar til lærararnar sambært lóg um frítíðarundirvísing, eins og at tað verður Tvøroyrar kommuna, sum søkir um endurgjald fyri løn til undirvísarar í føroyskum sum annaðmál sambært lógini um serstaka frítíðarundirvísing.*

*Meðan hendan avtalan er í gildi, er tað kvøldskúlaleiðslan í Tvøroyrar kommunu, sum skal tryggja, at næmingar úr allari Suðuroynni fáa møguleika fyri at tekna seg til skeiðini í føroyskum sum annaðmál, og at skeiðini í føroyskum fyri útlendingar verða hildin sambært námsætlanini um "Føroyskt sum annaðmál".*

*Meðan henda avtalan er í gildi, skal kvøldskúlaleiðslan í Tvøroyrar kommunu skipa fyri regluligum samskifti við aðrar kvøldskúlaleiðslur í Suðuroynni viðvíkjandi fyriskipan av undirvísing í føroyskum sum annaðmál eins og samskifta við UMMR.*

*Miðað verður eftir, at teir undirvísarar í føroyskum sum annaðmál, sum hava undirvíst í føroyskum fyri útlendingar í Suðuroynni frammanundan, standa fyri undirvísingini í 2021 og frameftir.*

*Leikluturin hjá UMMR*
*UMMR vil fegin stuðla undir hesa gongd at samskipa viðurskiftini millum kommunurnar í Suðuroynni í mun til undirvísing í føroyskum sum annaðmál og integratiónsviðurskiftum annars, og játtar tí við hesum 100 tímar afturat til undirvísingina á vári 2021, so at felags játtanin til føroyskt sum annaðmál til Suðuroynna verður 310 tímar til várhálvuna 2021.*

**Býráðið 27. mai 2021:**
Tvøroyrar býráð tekur einmælt undir við at átaka sær leiklutin sum samskipari av undirvísing í føroyskum sum annaðmál og integratiónsviðurskiftum fyri allar tilflytarar í Suðuroynni. Einmælt samtykt.

**Mentanarnevndin 08. juni 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin bjóðar UMMR (Helenu Dam á Neystabø) um at møta á fundi við Tvøroyrar kommunu fyri at lýsa ætlanina um integratión og undirvísing í føroyskum fyri tilflytara.

**Kommunustjórin 24.09.2021**
UMMR hevur játta Tvøroyrar kommunu 800 tímar til til skúlaári 2020-2021 til serstaka frítíðarundirvísing í føroyskum sum annaðmál. Tímabýtið er 400 tímar til heysthálvuna 2021 og 400 tímar til várhálvuna 2022.

**Kommunustjórin 10.10..2021**
Forkv. í Mentanarnevndini ynskir at bjóða Lív Næs á fund at greiða frá hvussu støðuni á málinum »Felags undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum»

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Lív Næs greiddi frá, at mentamálaráðið spyr regluliga um status á málinum. At tann 18. oktober verður byrja at undirvísa, og er talan um 38 næmingar, har 9 næmingar møta til dagsskeið.

Lív Næs ynskir, at kommunurnar sum eru við í skipanini fáa greiðu á, hvør starvast í skipanini, hvør er leiðari og hvør hevur ábyrgd av skipanini. At ein samskipari og visitator verður sett í starv.

Súsanna Bertholdsen greiddi frá fundinum í kommunufelagnum, har Helena Dam á Neystabø rósti støðuna í Suðuroynni, sum hevði tikið væl ímóti skipanini at undirvísa tilflytarar í føroyskum.

Einmælt samtykt, at Tvøroyrar kommuna tekur stig til at samskifta við allar kommunurnar í Suðuroynni, har m.a. greiða fæst á hesi viðurskiftir skjótast gjørligt.

**Kommunustjórin 10.03.2022**
Leiðarin av frítíðar- og kvøldskúlanum á Tvøroyri, Lív Næs hevði hin 9. mars, bjóða øllum borgarstjórum og umboðum úr øllum kommunum í Suðuroynni á fund í býráðssalinum hjá Tvøroyrar kommunu, at geva eina støðulýsing av málinum «Undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum»

Eftir framløguna var avtala, at luttakararnir skuldi fáa tilsent tilfar, ið greinar kostnaðin av «Undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar».

Breið semja var um, at kommunurnar vóru til reiðar at samstarva um ætlanina, men ynskiligt var at fáa greiðu á leiklutin hjá landinum, og játtanina frá landinum til ætlanina. Hetta fyri at greitt verður, hvørja ábyrgd og leiklut kommunurnar hava í ætlanini, og hvørja ábyrgd og leiklut landið hevur.

Møtt vøru:
- Eyðbjørn Thomsen, borgarstjóri, Sumba
- Bjarni Johansen, borgarstjóri, Vágs kommuna
- Petry Harginsdóttir Mortensen, býráðsskrivari, Vágs kommuna
- Jóannes Lisberg, borgarstjóri, Fámjins kommuna
- Delmar Tausen, borgarstjóri, Hovs kommuna
- Janus Thomsen, borgarstjóri, Hvalbiar kommuna
- Anita Vibergsdóttir, varaborgarstjóri, Tvøroyrar kommuna
- Lív Næs, Leiðarin av frítíðar- og kvøldskúlanum á Tvøroyri
- Fróði Mortensen, kommunustjóri, Tvøroyrar kommuna

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Lív Næs leiðari á Frítíðar og kvøldskúlanum kunnar um málið.
Lív Næs hevur samskiftir við Jógvan Sørin leiðari á Frítíðar og kvøldskúlin í Tórshavnar kommunu um hvussu Tórshavnar kommuna ætlar at skipa FSA ( Føroyskt sum anna mál) undirvísingina komandi skúlaár.
Einmælt samtykt at umsitingin fylgir upp uppá málið og samskiftir við Mentamálaráði um eina varandi ætlan viðvíkjandi FSA, við har til hoyrandi játtan frá Mentamálaráðnum.

**Kommunustjórin 11.09.2022**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá Uttanríkis- og Mentamálaráðnum dagf. 9. sep. 2022, at játtan á 1.100 tímar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál skúlaárið 2022-2023, verður veittur til kommunala samstarvið millum kvøldskúlaskipanirnar í Suðuroy at undirvísa tilflytarum í Føroyskum sum annaðmál.

Stuðulin verður játtaður til kvøldskúlaskipanina á Tvøroyri, sum fær ábyrgd av at umsita stuðulin sambært ásetingunum í hesum játtanarskrivi, eins og at kunna allar vaksnar tilflytarar í Suðuroynni um møguleikarnar at fylgja skeið og útbúgving í føroyskum sum annaðmál sum serstaka frítíðarundirvísing.

Innan karmarnar av hesari tilsøgn kann kommunala samstarvið í Suðuroynni skipa fyri serstøkum skeiðum fyri ukrainskum flóttafólki, ella bjóða hesum at taka lut í undirvísingini, sum verður fyriskipað fyri tilflytarar annars.

**Tímakostnaður og studningur**
Tímakostnaðurin skúlaárið 2022-23 er kr. 450,82. Íroknað tímakostnaðin eru frítíðarløn, leiðaraløn og lógarfest gjøld. *(Landskassastudningur er 100% av teimum stuðulsheimilaðu útreiðslunum)*

Tímabýtið er 550 tímar til heysthálvuna 2022 og 550 tímar til várhálvuna 2022.

**Treytir í sambandi undirvísingini í hesum skúlaári 2022 – 2023.**
Játtanin í 2022-2023 er treytað av játtan á Løgtingsins fíggjarlóg, og at niðanfyrstandandi treytir verða loknar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið setir hesar treytir fyri kvøldskúlaskipanina, ið umsitur og skipar undirvísing í føroyskum sum annaðmál í Suðuroy: (Tvs. Kvøldskúlaleiðsluna hjá Tvøroyrar kommunu)

1. *Frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað, næmingatal og virksemi lestrarhálvuna september 2022 til desember 2022 skal sendast UMMR í seinasta lagi 15. Oktober 2022. Og frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað lestrarhálvuna januar 2023 – juni 2023 verður send UMMR í seinasta lagi 15. Februar 2023.*

2. *Undirvísingin í føroyskum sum annaðmál skal fylgja námsætlanini í føroyskum sum annaðmál. Námsætlanin er tøk á heimasíðuni hjá Próvstovuni.*

3. *Undirvísing kann eisini fyriskipast sum styttri málskeið fyri tilflytarum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál.*

4. *Frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað, næmingatal og virksemi lestrarhálvuna september 2022 til desember 2022 skal sendast UMMR í seinasta lagi 15. Oktober 2022. Og frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað lestrarhálvuna januar 2023 – juni 2023 verður send UMMR í seinasta lagi 15. Februar 2023.*

5. *Næmingur, sum verður tikin inn á útbúgvingina FSA, verður visiteraður. Kvøldskúlin sendir í seinasta lagi 15. oktober 2022 UMMR yvirlit yvir úrslitið í visitatiónini.*

6. *Næmingar, sum fylgja styttri skeiði í føroyskum sum annaðmál, verða visiteraðir, tá ið skeiðið er av, so at næmingur kann taka støðu til, hvussu hann/hon kann halda fram í undirvísingini. Um visitator og lærari metir, at næmingur, sum hevur fylgt einum styttri skeiði er førur fyri at fara til stigroynd, kann tað verða fyriskipað í samráð við leiðslu skúlans og Próvstovuna.*

7. *UMMR stuðlar tilgongdini at menna mannagongdir í samband við visitering. Tímajáttan er sett av til visitering, har skúlin kann søkja um ½ tíma til hvønn næming, sum verður visiteraður.*

8. *Lærarin, sum undirvísir í føroyskum sum annaðmál, ger í samráð við kvøldskúlaleiðsluna yvirlit yvir lisnar tímar.*

9. *Yvirlit verður ført um uppmøting.*

10. *Kunning verður send UMMR um setanarviðurskifti hjá lærarum, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál.*

11. *Tímar, sum UMMR hevur játtað til undirvísing í føroyskum sum annaðmál, kunnu ikki brúkast til annað endamál innan frítíðarundirvísing.*

**Mentanarnevndin hjá Tvøroyrar býráð skal taka støðu til:**

1. At kvøldskúlaskipanin hjá Tvøroyrar kommuna átekur ábyrgd at umsita fyriliggjandi uppskotið og stuðulsjáttan frá UMMR til undirvísing í føroyskum sum annaðmál, stytt FSA.
2. At heimila kvøldskúlaleiðsluni hjá Tvøroyrar kommunu at seta undirvísarar í starv samb. játtnini til FSA og at kunna allar vaksnar tilflytarar í Suðuroynni um møguleikarnar at fylgja skeið og útbúgving í føroyskum sum annaðmál sum serstaka frítíðarundirvísing.

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað, og verður tikið uppá á einum seinni fundi.

**Kommunustjórin 28.09.2022:**
Samstarvsavtala var undirskriva 28.09.2022, har allar kommunur eru samdar um at skipa fyri felags FSA undirvísing í Suðuroynni. Avtlan gongur frá 1. Oktober 2022 til 1. Oktober 2026 ella inntil nýggj lóggávu verður givin á økinum. Avtalan kann sigast upp av báðum pørtum við átta mánaða ávaring.

Samstarvið er treytað av játtan til undirvísingartímar frá UMMR/US.
Næmingar rinda 500 kr. fyri undirvísingartilfar, sum verður goldið við tilmelding, og kommunurnar í Suðuroynni gjalda kr. 10,- pr. Borgara í kommununi til Tvøroyrar kvøldskúla fyri samskipan av FSA

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 19:20

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Reidar Simonsen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen